# Føroyingur vart serritgerð í læknafrøði

**Havnarmaðurin, Shahin Gaïni, vardi mikudagin Ph.D-ritgerð á Syddansk Universitet í Odense í læknafrøði**

LESNAÐUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Mikudagin vardi Shahin Gaïni úr Havn phd-ritgerð í Odensen. Ritgerðin hevur heitið: »New markers for infection and new methods in evaluation of the inflammatory status in patients with sepsis«.

Ritgerðin umfatar eitt yvirlit og fimm vísindaligar greinar, ið hava verið prentaðar í altjóða viðurkendum ritum.

Shahin Gaïni hevur síðstu árini verið knýttur at Infektionsmedicinsk Forskningsenhed, Klinisk Institut, Syddansk Universitet.

Í dómsnevndini sótu prof. dr.med. Else Tønnesen, dr. med. Thomas Benfield og prof. dr.med. Lars Melholt Rasmussen. Høvuðsvegleiðari til ritgerðina var lektor dr.med. Svend Stenvang Pedersen.

Shahin Gaïni, sum býr og starvast í Odense, er bróðir Firouz Gaïni, sum í desember vardi Ph.D-ritgerð á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum, har evnið var ungdómur, miðlar, mentan & seinmodernitetur í Føroyum.



*Shahin Gaïni hevur júst var phd-ritgerð í læknafrøði í Odense*

